# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Odd tók øll á bóli

**14 ára gamli Odd Andreasen var raskur til vaksnamanna-kappingina sunnudagin. Millum annað vann hann á Absaloni Hansen, sum er fleirfaldur føroyameistari í nógvum ítróttargreinum**

BOGASKJÓTING
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Ungi Odd Andreasen gjørdi veruliga um seg um vikuskiftið, tá hann vann kappingina hjá teimum ungu og bleiv nummar fýra hjá teimum vaksnu*

Leygardagin vann Odd Andresen kappingina fyri tey ungu. Fyrr í vikuni varð avgjørt, at hann og Oddmar Nielsen skuldu royna at skjóta saman við teimum vaksnu.

Hetta var ikki nakað Odd Andreasen nakrantíð angraði. Innleiðandi lá Odd á einum sjeynda plássi við 494 stigum, og hetta er ikki at kimsa at.

Tó gjørdist tað alsamt meiri spennandi hjá 14 ára gamla dronginum.

Í fyrsta finaludystinum skeyt Odd ímoti Fríða Andreassen. Odd lá frammanfyri innleiðandi, og var tí ein lítil favorittur til dystin.

Henda leiklut livdi hann eisini upp til, og vann við heili 19 stigum.

### Odd og Absalon

Síðani skuldi Odd Andreasen møta Absalon Hansen, sum hevur verið Føroyameistari í nógvum ítróttargreinum, umframt, at hann eigur metið á 18 metrum í bogaskjóting, sum var longdin sunnudagin.

Við javnari skjóting megnaði Odd at skjóta 101 stig. Hetta plagar ikki at vera nakar trupulleiki hjá Absalon Hansen, men sunnudagin var okkurt, sum ikki vildi sum Absalon, og tá liðugt var, høvdu teir báðir 101 stig.

Síðani skuldi umskjóting til.

Her verður fyrst ein pílur skotin. Fær annar meiri stig enn hin, so er liðugt, men verður javnt, so verður hildið fram einaferð enn. Um tríggir pílar skulu til, so vinnur tann, ið hevur pílin tættast miðjuni.

Í umskjótingini vóru báðir rættiliga trýstir. Við fyrsta pílinum fingu báðir átta stig.

Við næsta pílinum gjørdi Odd skjótt av, men aftur hesaferð fekk hann átta stig. Nú skuldi borið til hjá Absaloni at vunnið, men hann gjørdi sum Odd og fekk sama stigatal.

Nú skuldi seinasti pílurin skjótast. Odd ger skjótt av. Lyftir bogan og sleppur. Níggju.

Hetta setir trýst á Absalon, sum fleiri ferðir avgerð, at taka bogan niður. Tá hann einaferð sleppur, fer pílurin aftur í áttaran.

Sostatt varð Odd Andreasen klárur til hálvfinaluna.

### Tapti rest

Í hálvfinaluni møtti hann Anniku Vang. Her gjørdist Odd minni maðurin. Tað var sum luftin var farin úr ballónini, tí nú fekk hann bert 80 stig og tapti við 18 stigum.

Síðani kom bronsudysturin. Her møtti Odd Eiriki í Jákupsstovu. Eirikur hevur vant Odd eitt sindur um skjóting í vetur, so Odd var grammur at vinna.

Nú megnaði drongurin at skjóta betur og fekk 99 stig. Hetta var tó ongantíð nógv mikið, tá Eirikur fekk 102 stig.

Hóast tað ikki gekk so væl hjá Odd, tá hann kom til hálvfinalurnar, so var lítli 14 ára gamli drongurin sera væl nøgdur við kappingina.

## Oddarnir hjá Oddi vóru bestir

**Bogaskjótikapping fyri ung var leygardagin. Tað vísti seg, at oddarnir á pílunum hjá Oddi Andreassen raktu skivuna best**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Seinasta vanliga bogaskjótikappingin fyri ung var á Skipasmiðjuni í Havn í dag. Bert sjey luttakarar vóru við í kappingini, men støðið á ovaru helvtini var hægri, enn tað hevur verið í ungdómsskjóting í recurve í fleiri ár.

Talan var um kapping á 15 metrum. Ungdómur skýtur bæði 12 og 15 metrar.

Oddmar Nielsen, Sirið Rein og Odd Andreassen vóru innleiðandi øll omanfyri 500 stig av 600 møguligum.

Í hálvfinalunum gjørdi Sirið Rein bart, og sendi Oddmar Nielsen so barlangan í bronsufinaluna, meðan hon sjálv fór í finaluna. Hon vann við heili sjey stigum, sum er nógv, tá bert 12 pílar verða skotnir.

Í hinari hálvfinaluni skutu Odd og Bjarni. Her vann Odd við 10 stigum, hóast skjótingin hjá Oddi var langt niðanfyri tað, hann eigur at skjóta.

Í bronsudystinum bleiv tað ongantíð veruliga spennandi, tí Bjarni, sum annar hevði skotið væl, fór eitt sindur niður og fekk bert 79 stig av 120 møguligum. Oddmar fekk 102.

Í finaluni hittust Sirið Rein og Odd Andreassen. Sirið royndi tað hon kundi, men oddarnir hjá Oddi sótu bara betri.

Endin varð, at Odd vann við 107 stigum ímóti 100 hjá Sirið.

# Jógvan Niclasen aftur á toppinum



*Frá vinstru. Magnus Andreasen nr 2. Jógvan Niclasen nr 1. og Albert Dam nr 3*

**Hóast tað eitt sindur síðani, at Jógvan Niclasen hevur verið til kapping, so megnaði hann at vinna í compoundbólkinum**

BOGASKJÓTING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Compound skjúttarnir vóru 11 í høllini á Eiði í dag. Støðið var sum heild javnt.

Innleiðandi var øgiliga javnt frá nummar 2 til nummar 7. Bara 11 stig vóru ímillum tann nummar tvey og sjey. Hetta er ikki nógv, tá møguleiki er at fáa 600 stig.

Síðani vóru finalurnar á skránni. Her vóru nakrir javnir dystir. Og serliga dystirnir hjá Rakul Dam vóru javnir. Tó tapti hon við einum stigið ímóti soni sínum, Jógvani Niclasen í fjórðingsfinaluni.

Í bronsudystinum skutu Sigrid Vang og Albert Dam. Hendan dystin vann Albert við einum stigið.

Í sjálvari finaluni skutu Jógvan Niclasen og 16 ára gamla talentið Magnus Andreasen. Her vann Jógvan við 115 stigum ímóti teimum 110 hjá Magnusi.

# Jøvn recurvekapping

**Í recurvebólkinum í bogaskjótikappingini á Eiði, vann Hans Petur Højgaard**

BOGASKJÓTING
*Eyðun Klakstein*
*Eydun@sosialurin.fo*

Heili 12 skjúttar luttóku í recurvekappingini. Hetta kom fyrst og fremst av, at nakrir ungdómsskjúttar hava tikið stigið at skjóta saman við teimum vaksnu.

Innleiðandi skjótingin var ikki so góð, hóast nógvir av ungu skjúttunum høvdu persónlig met.

Í finalunum gjørdist tó frægari, og eldru skjúttarnir byrjaðu at raka støðið.

Í hálvfinaluni skuldi Odd Andreasen skjóta ímóti Anniku Vang. Hetta bleiv ein ov stórur biti fyri 14 ára gamla drongin, og Annika Vang vann við 18 stigum.

Í hinari hálvfinaluni skutu Eirikur í Jákupsstovu og Hans Petur Højgaard. Her vann Hans Petur við 14 stigum.

Bronsudysturin var millum Eirik í Jákupsstovu og Odd Andreasen. Henda dyst vann Eirikur við 102 stigum ímóti teimum 99 hjá Odd.

Í finaluni skutu Annika Vang og Hans Petur Højgaard. Henda dyst vann Hans Petur við einum stigið. 109 – 108 endaði tað. Her er talan um góða skjóting.



*Hans Petur Højgaard í miðjuni var greiður vinnari í recurvekappingini. Honum á baki komu Annika Vang t.v. og Eirikur í Jákupsstovu t.h.*